# Ferðsluvanlukka kravdi trý mannalív



*Bilurin er bóltaður einar 50 til 100 metrar oman móti sjóvarmálanum*
*Mynd: Jonhard Hammer*

**Tríggir dreingir, 18, 19 og 22 ára gamlir, doyðu fríggjanáttina, tá ein bilur fór út av vegnum við grótbrotið á Lambareiði**

FERÐSLUVANLUKKA
*Eirikur Lindenskov*

Ein ferðsluvanlukka á Lambareiði á Skálafjørðinum gjáranáttina hevur kravt trý mannalív.

Fimm fólk vóru í nýggja Ford Mondeo bilinum, sum koyrdi inn eftir vegnum við grótbrotið á Lambareiði um trítíðina, tá førarin eftir øllum at døma misti tamarhaldið á bilinum.

– Bilurin hevur fyrst rent í laðaða grótkantin í eystaru síðu á vegnum. Síðani er bilurin slongdur út av vegnum á niðaru síðu og er bóltaður einar 50 til 100 metrar oman eftir bakkanum, greiðir Jógvan E. Ósá, virkandi sýslumaður í Runavík, frá.

– Alt bendir á, at ov nógv ferð hevur verið orsøkin, og einki er, sum bendir á, at rúsdrekka hevur verið uppi í, sigur hann.

Tað var ein vaktarmaður í Eysturoy, sum boðaði frá vanlukkuni. Hann kom á staðið beint fyri kl 4 og boðaði alarmsentralinum í Havn frá klokkan 03:49.

– Lækni kom beinan vegin á staðið, og fýra sjúkrabilar, sum vóru við í eini venjing í Kollfjarðatunnlinum, komu eisini beinan vegin á staðið, greiðir Jógvan E. Ósá frá.

Læknin kundi staðfesta, at teir tríggir ungu menninir vóru deyðir.

Við í hjálpararbeiðinum vóru eisini níggju mans frá sløkkiliðinum á Skálafjørðinum og tveir av kubatrolarunum, Gorpur og Skrápur, sum um hetta mundið komu inn eftir Skálafjørðinum, varpaðu ljós yvir vanlukkustaðið.

Jógvan E. Ósá sigur, at støðan hjá hinum báðum fólkunum í bilinum, eini 17 ára gomlari gentu og einum 22 ára gamlum dreingi, var stabil.



*Bilurin rendi fyrst í kantin oman fyri vegin, áðrenn hann bóltaði upp um autoverjuna og oman eftir bakkanum*
*Mynd: Jonhard Hammer*


Brúktbila shokk





Vit hava koyrt okkara brúktbilaprísir niður við



5-20.000 kr.

Kom og ger várkvetti

P/f Wenzel

Akranesgøta 5 - FO 100 Tórshavn - Tel. 313873
Fax 311173 - Heimasíða: www.wenzel.fo

Sosialurin - 311820


## Vanlukkurnar henda um náttina

**Leiðarin á Ferðslutrygd hevði tikið undir við einum uppskoti, sum bannaði ungum fólki at koyra um náttina**

FERÐSLUVANLUKKUR
*Eirikur Lindenskov*

– Hagtølini vísa, at størsti parturin av álvarsomu ferðsluvanlukkunum henda um náttina, og at tað serliga eru tey ungu, ið koma út fyri álvarsomum vanlukkum.

Hetta sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd.

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur seinastu árini skipað fyri serligum átaki, har allir næmingarnir í 9. flokkunum eru við á dagsskeiði um Ferðslutrygd.

Jón Kragesteen sigur, at kjarnin í skeiðinum er fyrilestur, sum verður hildin av ungum fólki, sum hevur verið fyri ferðsluvanlukku og hevur fingið álvarsligt mein.

– Endamálið við slíkum undirvísingarátaki er at seta avleiðingarnar av ferðsluvanlukkum í brennidepilin, at teir verða gjørdir so ítøkiligir, sum til ber, so næmingarnir veruliga sanna, at hetta eisini er nakað, sum kann raka teir, sigur Jón Kragesteen.

Fyrr hevur nógv verið frammi um, hvat kann gerast fyri at minka um álvarsomu ferðsluvanlukkurnar, og tá hevur onkuntíð verið nevnt, at ungir dreingir ikki áttu at sloppið at koyrt um náttina. Miðskeiðis í áttatiárunum hevði Vilhelm Johannesen, sum tá var landsstýrismaður, eitt slíkt uppskot frammi, men tað vann ikki frama.

– Eg hevði tikið undir við einum uppskoti, sum bannaði ungum dreingjum at koyra um náttina, sigur Jón Kragesteen.

Hetta sigur hann av teirri einfaldu orsøk, at hesar vanlukkur henda um náttina, og um ungu fólkini ikki koyrdu um náttina, so hendu slíkar vanlukkur ikki.

Jón Kragesteen viðgongur, at lógarreglur kunnu gerast so truplar, at tað ikki ber til at halda tær. Men hann heldur ikki, at tað hevði verið ómøguligt at handhevað eina lóg, sum bannaði fólki í ávísum aldri at koyra um náttina.



# Landsstýrið kannar KT-vinnnu í Ísrael

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, fer mánadagin á almenna arbeiðsvitjan í Ísrael. Endamálið við ferðini er at kanna ísraelskan KT-vinnupolitikk**

SAMSTARV
*John Johannessen*

Ísraelski politikkurin innan KT-vinnuna skal vera fyrimynd fyri einum skipaðum KT-vinnupolitikki í Føroyum.

Hetta hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, sett sær fyri.

Bjarni Djurholm fer í hesum sambandi mánadagin til Ísraels á almenna arbeiðsvitjan. Bjarni Djurholm skal hitta ísraelska samskiftismálaráðharran, Reuven Rivlin, og eisini skal hann vitja ísraelska Vinnumálastýrið, ymsar KT-klekingardeplar, fyrrverandi einkartelefelagið Bezeq og aðrar tele- og KT fyritøkur.



*Ísrael skal vera fyrimynd fyri einum komandi føroyskum politikki innan KT-vinnu. Tað hevur landsstýrismaðurin í Vinnumálum, Bjarni Djurholm, gjørt av. Hann fer í hesum sambandi arbeiðsferð til Ísraels mánadagin*

### Fyrimynd í liberalisering

Landsstýrismaðurin í vinnumálum sigur í tíðindaskrivi, at Ísrael, sum er tilfeingisfátækt, er í dag undangonguland innan KT-vinnu og hevur næsthægsta tal av nýstovnaðum virkjum í mun til fólkatalið. Tað er bert USA, ið er frammanfyri.

– KT-vinnupolitikkurin í Ísrael hevur millum annað serligt atlit at liberaliseringini av fjarskiftismarknaðinum, gransking og menning, at menna kapitalmarknaðin og at draga útlendskar íleggjarar til. Millum 1986 og 1999 eru tilsamans 75 almenn partafeløg privatiserað í Ísrael, vísir Bjarni Djurholm á.

Landsstýrismaðurin ætlar sær at leggja ein skipaðan KT-vinnupolitikk fyri løgtingið á Ólavsøku. Eitt endamál við ferðini til Ísraels er at fáa íblástur til føroyska KT-vinnupolitikkin.

### Skapa samstarv

Bjarni Djurholm sigur, at hann eisini ætlar sær at royna at fáa Ísrael vinnuliga at venda eyguni móti Føroyum, og soleiðis styrkja bondini millum Ísrael og Føroyar.

– Vinnupolitiska mál okkara er at fjøltátta føroyska vinnu. Ísrael hevur ein stimbrandi kapitalmarknað við millum øðrum 80 framtaksfeløgum, sum nú venda eyguni móti øðrum londum. Møguleikar eru tí eisini at draga hagani hátøkni, arbeiðsmegi, íløgufeløg og annars virka fyri samstarvi millum føroysk og ísraelsk vinnuvirki, sigur Bjarni Djurholm.

## Økisfundur í Skálavík

TÍÐINDASKRIV

Sandoyar sýslu Javnaðarfelag og starvsnevnd Javnaðarfloksins skipa í sambandi við aðalfundin hjá felagnum fyri kvøldsetu í Kelduni í Skálavík mánakvøldið klokkan 20.

Á fundinum verða tinglimirnir og starvsnevndin hjá flokkinum, og SU verður eisini við. Aftan á sjálvan aðalfundin verður politiskt orðaskifti. Allir limir og javnaðaráhugað fáa høvi at skifta orð við tingmanningina og starvsnevndina um dagsins politikk og javnaðarhugsjónina í síni heild.

Fundurin verður skipaður sum kvøldseta við sangi og tónleiki, og borðreitt verður við breyði og viðskera. Felagið skipar eisini fyri burturluting.

Ætlanin hjá starvsnevndini er, at slíkir fundir verða skipaðir um alt landið. Flokkurin vil fegin hava limirnar og fólk, ið brenna fyri javnaðarhugsjónini, at hittast oftari at tala um felags áhugamál. Hetta er ein natúrligur partur av felagsvirkseminum hjá einum livandi flokki.

Tey valdu umboðini í starvsnevnd og ikki minni á tingi hava fyri neyðini at samskifta regluliga við veljaran. Hesin fyrsti fundurin av sínum slag er partur í ætlan floksins at koma limunum og veljarunum nærri, tí tað er í teirra tænastu, tinglimir og starvsnevnd starva.

# Fólkaflokkurin stuðlar Ísrael

**Føroyski Fólkaflokkurin harmast atfinningarnar hjá danska uttanríkisráðharranum móti Ísrael í sambandi við stríðið móti palestinum. Óli Breckmann, formaður floksins, hevur sent ísraelska forsetanum stuðulsbræv**

MIÐEYSTUR
*John Johannessen*

Ein ovurstórur meiriluti av føroyska fólkinum stuðlar Ísrael í stríðnum móti palestinum.

Hetta staðfestir Óli Breckmann, formaður Fólkafloksins, í brævi til ísraelska forsetan, Ariel Sharon.

– Ver vísur í, at ein ovurstórur meiriluti av føroyska fólkinum fult stuðlar rættindunum hjá ísraelsku stjórnini at taka øll neyðug stig í Heilaga Landinum, í Judea, Samaria og Gaza fyri at tryggja frið og tryggleika fyri ísraelska statin og allar borgarar hansara

### Harmast atfinningarnar

Óli Breckmann sigur í brævinum til Ariel Sharon, at Fólkaflokkurin harmast atfinningarnar hjá danska uttanríkisráðharranum, Mogens Lykketoft, ímóti Ísrael.

Mogens Lykketoft hevur átalað atgerðirnar hjá Ísrael móti palestinum í royndunum at forða palestinskum atgerðum móti ísraelsfólki.

– Formelt hevur danska stjórnin enn ábyrgdina fyri uttanríkispolitikki Føroya. Tískil umboðar harra Lykketoft alment Føroyar mótvegis triðjalondum, sum Ísrael, staðfestir Óli Breckmann.

Óli Breckmann endar brævið til ísraelska forsetan soleiðis:

»Guðs signing í týdningarmikla arbeiði tygara fyri Ísrael, fyri friði í Miðeystri og fyri allan heimi. Shalom.«

### Vil ikki blandast uppí

Óli Breckmann hevur skrivað brævið vegna Fólkaflokkin, og hann hevur skrivað undir, sum formaður floksins, løgtingsumboð og fólkatingsumboð. Tí kann eingin ivi vera um, at meiningin í brævinum umboðar allan Fólkaflokkin.

Sosialurin hevur spurt løgmann, hvat hann heldur um, at flokkurin, sum situr við stjórnarleiðsluni í Føroyum, meldar so staðiliga út um stríðið í Miðeystri. Men løgmaður hevur ongar stórvegis viðmerkingar til brævið.

– Løgmaður er ikki Fólkaflokkurin. Tað, sum stendur í brævinum, er støða Fólkafloksins. Var tað løgmanssins støða, hevði tað verið eg, sum skrivaði undir sum løgmaður vegna landsstýrið.


HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

Ógloymandi borðhald og
SPENNANDI ÚTFERÐIR
28. apríl
- bert fá pláss eru eftir -

Vit stíla fyri:
· Útferð
· Stórari "fjalla"-buffet við meira enn 30 ymsum rættum
· Dansi
· Vistarhaldi
· Flutningi

Eitt gott tiltak - bæði fyri náttúrufólk og fólk í veitslulag -

Legg saman flutning, útferð, "fjalla"-buffet, gisting og dans og tú fært:
eina ógloymandi vikuskiftisútferð
fyri 695,-
í dupultkamari
v/ gisting og flutningi úr Havnini

Vel ímillum hesar útferðir:
• Gongutúr niðan á Egg
• Gongutúr til Bøsdalafoss
• Siglitúr um Tindhólm (100,- kr. eyka)
Allir túrarnir eru við ferðaleiðara

The Sunshine Band
undirhalda og spæla til dans

Útferð, borðhald og dansur
325,-

Dansur 125,-

Útferðirnar byrja kl. 14.00
Borðhaldið byrjar uml. kl. 19.00
Dansur er frá kl. 23.00
Bíleggið í góðari tíð
á tel 33 29 55
- avmarkað atgongd -

Eisini fyriskipa vit útferðir
fyri virkir og feløg
Ring og hoyr nærri!

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo